Ring til fartelefonina hjá Martin og legg á aftan á tvey signal! Hann svevur á sofuni og er púra ógjørligur at vakja!
**Kvinna, 35 ár**

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein / Inna Törnroos

# Miðlamjarr

Í Føroyum eru nógvir møguleikar, ið ikki eru troyttir. Men nakrir eru kanska nakað móðir :)
**Maður, 43 ár**

Føroyskar kvinnur eru nógvar ferðir fríari enn mannfólkini, og eg fái nógvar fyrispurningar frá kvinnum, sum vilja hava ráð og vegleðing.
Elin í Stórustovu, sexologur (Sosialurin)







*Lívsins skúli er góð barlast.*
46 ára gamli Fríðrik Sivertsen tikið skipsførara-prógv við bert 9. Floksprógvi (Sosialurin)

*Vilja vit hava sterkt øl til landið, skulu vit sjálvandi eisini kunna framleiða tað. Sama er galdandi fyri rúsdrekka, vit innflyta whiskey, men kunnu ikki framleiða tað. Tað er ein dupult*

Drongurin kom inn til mammu sína við einum hundalorti í hondini: Hygg mamma, hvat eg mundi traðka á!
**Kvinna 36 ár**

Góði jólamaður. Aftur í ár ynski eg mær eina feita bankabók, og ein slankan krop, ikki umvent, sum tú so tíðuliga gjørdi seinasta ár. Takk fyri fyrst :)
**Kvinna, 55 ár**

*Tað er gott at síggja, at Havnin hevur ein borgmeistara, sum roynir at verja sína egnu borg.*
Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, heldur, at Heðin Mortensen er ein lokalpolitikari.





Farið og njótið fulla pensjón fyri einans átta ára starvstíð, skrivið út val og latið vera við at stilla uppaftur
Kári á Rógvi, formaður í Sjálvstýrisflokkinum, við ráðum til núverandi og fyrrverandi landsstýrisfólk.



Eitt av mínum fjálgu minnum er ein vát nátt í Santander saman við góðum vinum - og baskiskum loysingarfólkum. Totalur niðurtúrur at koma heim til rúsdrekkalógina - og føroysk sambandsfólk.
**Maður, 50 ár**

*Eg dugi illa at halda eina hemmiligheit. Vilt tú halda nakað hemmiligt, so fortel tað so ikki fyri mær.*
Songkvinnan og sjónleikarin Miley Cyrus er erligari enn flestar kvinnur.